# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Einar verður verandi

Einar T. Hansen spælir eisini við barndómsfelagnum í 2011. Heimasíðan hjá NSÍ skrivar, at felagið hevur skrivað sáttmála við landsliðsleikaran. Einar T. Hansen er 22 ára gamal. Hann spældi 25 dystir í Vodafonedeildini í fjør, umframt dystirnar í steypakappingini og Europe League. Einar T. Hansen hevur mest røkt uppgávuna sum vinstri bakkur, men hann hevur eisini fingið seg royndan í miðverjuni.



**Tað vísir seg, at vit misnýta ov nógvar upplagdar møguleikar. Tað hevur verið ein trupulleiki í fleiri dystum**

JULIAN JOHANSEN, KYNDIL



**Eg havi spælt nógv saman við Poul F. Joensen hjá TB. Tað, at vit skulu kappast næsta ár, hugsi eg ikki stórvegis um**

JÓN JOHANNESEN, TB



Savnsmynd

# Gunnar í niðurflytingarvanda

**FÓTBÓLTUR** Tað eru trý mál, sum skilja Tranmere Rovers frá niðurflytingarstrikuni í League One í løtuni

Uni Holm Johannesen

Gunnar Nielsen og Tranmere Rovers taptu fyri Leyton Orient í vikuskiftinum.

Føroyski landsliðsmálverjin vardi málið á heimavøllinum. Gestirnir, sum vóru eitt stig aftan fyri Tranmere Rovers undan dystinum, vunnu 2-1.

Leyton Orient var á odda 2-0 í steðginum. Heimaliðið hevði fleiri møguleikar í seinna hálvleiki, men fekk bara eitt mál.

Tranmere Rovers er nú nummar 20 við 22 stigum. Trý onnur lið hava sama stigatal.

Gunnar Nielsen og liðfelagarnir vitja Swindon næsta vikuskiftið. Í morgin er útsetti dysturin móti Huddersfield í Johnstone's Paint Trophy á skránni.

# *Miðlarnir skriva...*

*»Nú nýggjar reglur um drál eru settar í gildi, sýnist hetta so fremjandi átak til álopsfremjandi hondbolt at hava mist sína funktión. Nú ber til at vera í drálstøðu so leingi at hetta helst átti at veri avtikið. Nakað soleiðis føldist hetta í hvussu er.«*

**Heimasíðan hjá H71**

*»Tá ið neistamenn skjóta 39 mál og strandingar 35 mál, so eru sjálvandi nógv frálík álop og nógv væl skotin mál, men spælararnir á báðum liðunum sleppa alt ov lætt fram at sjálvtøkuborðinum. Tú kundi ynskt tær eina verjujólagávu frá neistamonnum leygardagin, tá ið liðið spælir ímóti Kyndli.«*

**Heimasíðan hjá Neistanum**

*»07 Vestur letur ongan iva vera um, at framtíð felagsins byggir á eitt sterkt barna- og undómsarbeiði og lokalar leikarar sum fylgja harav.«*

**Heimasíðan hjá 07 Vestur**

## KLUMMA

# Hvar gongur markið hjá fjølmiðlunum?

Uni Holm Johannesen

Vit spæla øll við.

Eitt føroyskt ella útlendskt felag boðar frá á sínari heimasíðu, at ein ungur føroyingur er farin uttanlands at royndarvenja.

Portalurin er skjótur at varpa tíðindini út. Tað eru jú løtt og áhugaverd tíðindi. Við stórari mynd verður skrivað um unga føroyingin, sum fær seg royndan í donskum, skotskum ella enskum fótbólti.

Fólk eru forvitin. Tey lesa, práta á arbeiðsplássinum, og vænta sær nógv unglinginum, tá hann kemur aftur til Føroya.

Ungi leikarin, sum hevur verið til royndarvenjingar, fær umrøðu og sjálvsálit. Kanska ov nógv sjálvsálit, uttan veruliga at hava prógvað nakað sum helst. Tí hann fekk ongan sáttmála.

Eg, og fleiri onnur við, eru lopin í grøvina fleiri ferðir. Vit vilja vera við, har tað hendir, og tí er upplagt at boða frá, at ein føroyskur fótbóltsleikari royndarvenur uttanlands. Men tænur tað nøkrum endamáli?

Todi Jónsson er ein av teimum fáu føroyingunum, sum hava staðið seg í donskum fótbólti. Hann ivaðist ikki, tá Sosialurin prátaði við hann fyri tveimum árum síðan.

– Eg meti tað vera ein stórur veikleiki. Bara onkur føroyingur fer uttanlands at royndarvenja, so kanst tú lesa um tað á Portalinum, Vikublaðnum ella aðrastaðni. Tað gevur teimum beinanvegin eitt status, sum leggur óneyðugt trýst á leikaran. Tað er rættiliga langur vegur frá royndarvenjing til succes. Ómetaliga langur. Eg góðtaki umrøðu, um eg havi uppiborið tað. Men fert tú sum føroyingur til eitt nú Liverpool í dag at royndarvenja, so vita øll, hvør tú er, tá tú kemur heim. Og tá kemur trýstið uttanfrá, segði Todi Jónsson á sumri í 2008.

Tað er ein sannroynd at fleiri unglingar duga illa at handfara viðgongd. Tað tykist sum, at tá teir hava fingið luft undir veingirnar, so missa teir samstundis sambandið við umheimin.

Vegurin frá grundini og upp á føroyska tindin er ótrúliga lítil. Tilfeingið er lítið, og tí noyðast fleiri feløg at seta sítt álit á unglingar, sum fáa nógva umrøðu og viðurkenning sum 19 ára gamlir. Úrslitið er, at leikararnir stórtrívast í Føroyum, tí feløgini kasta eina rúgvu av pengum eftir teimum.

Men at hava succes í Føroyum er evarska lítið á stóra fótbóltspallinum. Fjølmiðlarnir hava hinvegin ofta hug at billa leikarunum inn, at tað er stórt og eydnuríkt.

Hvar gongur markið hjá fjølmiðlunum? Er tað rætt, at vit varpa ljós á føroyingar, sum fara uttanlands at royndarvenja? Ella skriva um hvønn einstaka leikara, sum hevur longt sín sáttmála við eitt føroyskt felag? Eru tað tíðindini, sum gagna fótbóltinum í longdini?

Tað er í øllum førum spurningar, sum fjølmiðlarnir skulu seta sær sjálvum.